Tá Føroyar vóru komnar nøkunlunda aftur á rættkjøl, aftan á at danir høvdu pumpað 3 milliardir kr. inn í føroyska búskapin, umframt blokkstuðulin upp á eina milliard árliga, legði Høgni Hoydal til brots og setti sær nýggj mál. Vit skuldu eina ferð enn hava ein sjálvberandi búskap. Árligu almennu útreiðslurnar "eksploderaðu" eftir heilt stuttari tíð. Hetta ber ikki upp undir nakran sjálvberandi búskap, tvørtur ímóti. Vit skuldu eisini hava loysing, og danir skuldu halda áfram við at gjalda. Ein long røð av nýggjum embætismonnum vórðu settir í starv fyri at skriva hvítubók og leggja til rættis strategiina til at náa málini hjá Høgna.

# visjón 2015?






tað er ein heilt onnu søga. Lat okkum hyggja nærri at teimum seinastu málunum, sum Tjóðveldisflokkurin og Høgni settu sær.

**Samgongan seinnu helvt av ottatiárunum.**
Høvuðsendamálið við samgonguni 1985 til 1988 var at skapa ein sjálvberandi búskap. Úrslitið bleiv, at nýggj lán frá útlondum uppá 6 til 7 milliardir eftur boðum og loyvi frá fíggjarmálaráðharra Tjóðveldisfloksins vórðu upptikin eftir 4 árum, umframt at allur peningurin frá útflutningi og blokkstuðuli fór upp í royk. Flestu nýggju lánini forðaðu fyri einum sjálvberandi búskapi. Føroyar fóru logandi á húsagang.

**Høgni Hoydal í samgongu**
Tá Føroyar vóru komnar nøkunlunda aftur á rættkjøl, aftan á at danir høvdu pumpað 3 milliardir kr. inn í føroyska búskapin, umframt blokkstuðulin upp á eina milliard árliga, legði Høgni Hoydal til brots og setti sær nýggj mál. Vit skuldu eina ferð enn hava ein sjálvberandi búskap. Árligu almennu útreiðslurnar "eksploderaðu" eftir heilt stuttari tíð. Hetta ber ikki upp undir nakran sjálvberandi búskap, tvørtur ímóti. Vit skuldu eisini hava loysing, og danir skuldu halda áfram við at gjalda. Ein long røð av nýggjum embætismonnum vórðu settir í starv fyri at skriva hvítubók og leggja til rættis strategiina til at náa málini hjá Høgna.

"Klimaks" upplivdu vit við álopinum á Keypmannahavn. Tríggir teir ovastu herleiðararnir, Annfinn, Høgni og Helena nýttu sama "taktikk" sum amerikumenn nýttu, tá teir fóru inn í Golfin og longur eystur, tá teir bjóðaðu fjølmiðlunum við inn í stríðsvognarnar. Okkara herovastar bjóðaðu allari pressuni við í flogfarið hjá Atlantsflog til Keypmannahavnar. Her umframt høvdu teir professionellan "krígsfilmfotograf" við sær. Tað sigst, at amerikumenn í byrjanini høvdu amerikanska fólkið við sær, men at teir høvdu ov fáar hermenn við sær eystur eftir til at vinna endaliga sigurin. Okkara herovastar høvdu ikki føroyska fólkið við sær, og tað vistu danir. Onki úrslit, uttan ein vanærulig skomm fyri Føroyar.

**Enn sær visjón 2015 sera soltin út – sum eitt "piðað jakkatræ"**
Og tá báðir omanfyrinevndu landsstýrismennirnir, enntá fleiri ferðir, í samrøðuni við Sosialin lova, at tilfarið verður "kókað" niður, er kanska ikki so nógv í væntu. Tað er sera sera harmuligt, men hóast alt frægari enn, um andstøðan sleppur at taka yvir, og eina ferð enn setur sær nýggj stór mál.